# VEGLEIÐING UM FLUTNING AV PERSÓNUPPLÝSINGUM ÚR FØROYUM

Januar 2021

1. útgáva

Dátueftirlitið

# Innihaldsyvirlit

**1. Flutningur av persónupplýsingum úr Føroyum ..........2**

1.1 Hvat er flutningur? ..........2

1.2 Trygg og ótrygg triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir ..........3

1.3 Serligt um flutning til útlond og triðjalond og váðan sum kann standast av hesum ..........3

1.4 Klaga til Dátueftirlitið ..........4

**2. Flutningur av persónupplýsingum til útlond ..........5**

**3. Flutningur til trygg triðjalond ..........6**

**4. Flutningur til ótrygg triðjalond – fullgóð trygd ..........8**

4.1 Bindandi skjal millum almennar myndugleikar ..........8

4.2 Standardásetingar um dátuvernd ..........9

4.3 Ad hoc–avtalur ..........9

**5. Flutningur til ótrygg triðjalond – serlig undantøk ..........11**

5.1 Nágreiniligt samtykki ..........11

5.2 Neyðugt fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran ..........12

5.3 Neyðugt fyri at fáa í lag ella halda eina avtalu, sum er til fyrimuns fyri skrásetta ..........13

5.4 Neyðugt fyri týðandi samfelagsáhugamál ..........13

5.5 Neyðugt fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast ..........14

5.6 Neyðugt fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ..........14

5.7 Flutningurin verður framdur frá einari skrá ..........15

5.8 Týðandi heimilað áhugamál hjá dátuábyrgdaranum og hóskandi trygd verður veitt ..........16

5.8.1 Nærri um týðandi heimilað áhugamál hjá dátuábyrgdaranum ..........16

5.8.2 Meting av um tey týðandi áhugamálini hjá dátuábyrgdaranum viga tyngri enn áhugamálini og rættindini hjá skrásetta ..........17

5.8.3 Nærri um fullgóða trygd fyri vernd av persónupplýsingum ..........17

5.8.4 Nærri um kunning til skrásetta ..........17

5.8.5 Nærri um kunning til Dátueftirlitið ..........18

**6. Skund vegleiðing um flutning ..........19**

# 1. Flutningur av persónupplýsingum úr Føroyum

Kapittul 6 í dátuverndarlógini ásetur, nær persónupplýsingar kunnu flytast úr Føroyum til útlond, triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir.

Endamálið við reglunum er at tryggja, at verndin av persónsupplýsingum er á einum hóskandi støði, óansæð um persónupplýsingarnar verða viðgjørdar í Føroyum ella uttanlands.

## 1.1 Hvat er flutningur?

Tað fyrsta sum er týdningarmikið at vita er, hvat "flutningur av persónupplýsingum" er og hvat tað fevnir um.

Flutningur av persónupplýsingum fer fram, tá ein dátuábyrgdari flytur persónupplýsingar úr Føroyum til ein dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum er staðsettur uttan fyri Føroyar.

Flutningur er t.d. tá persónupplýsingar talgilt verða sendar úr Føroyum til eitt annað land. Talan er eisini um flutning, tá ein USB lykil við persónupplýsingum verður sendur úr Føroyum til eitt annað land. Talan kann eisini verða um flutning av persónupplýsingum, tá biologiskur vevnaður verður sendur úr Føroyum til eitt annað land. Tað er eisini flutningur, um ein persónur uttanfyri Føroyar fær atgongd til persónupplýsingar, sum eru í Føroyum.

**Dømi 1**

Ein fyritøka í Føroyum ætlar at brúka eina fyritøku í Indien til KT-support. Starvsfólkini í India hava ikki atgongd til at goyma ella printa persónupplýsingar. Starvsfólkini hava tó atgongd til at síggja persónupplýsingar.

*Talan er í hesum føri um flutning av persónupplýsingum til triðjaland, tá starvsfólk í tí indisku fyritøkuni fáa atgongd til persónupplýsingar í Føroyum. Tað ger ongan mun, at tað einans er møguligt at síggja persónupplýsingarnar í India. Tað ger heldur ongan mun at starvsfólkini í India ikki skilja føroyskt.*

**Dømi 2**

Eitt starvsfólk hjá Almannaverkinum er og ferðast í Brasil. Undir feriuni kannar starvsfólkið arbeiðsteldupostin og fær tá atgongd til persónupplýsingar.

*Talan er í hesum føri um flutning av persónupplýsingum til triðjaland, tá ein persónur staðsettur í Brasil fær atgongd til persónupplýsingar í Føroyum.*

## 1.2 Trygg og ótrygg triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir

Í dátuverndarlógini verður munur gjørdur á, um persónupplýsingar verða fluttar til trygg ella ótrygg triðjalond.

Er talan um trygt triðjaland kann flutningurin av persónsupplýsingum sum útgangsstøði fara fram uttan serliga heimild. Flutningur til ótrygg triðjalond krevur hinvegin, at fullgóð trygd verður veitt fyri viðgerðini av persónsupplýsingum ella eitt av undantøkunum í dátuverendarlógini ger seg galdandi. Les meira um trygg og ótrygg triðjalond longri niðri.

## 1.3 Serligt um flutning til útlond og triðjalond og váðan sum kann standast av hesum

Dátuverndarlógin ásetur, at tann sum hevur ábyrgdina av viðgerðini av persónupplýsingum – dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin – skal tryggja eitt hóskandi verndarstøði av persónupplýsingunum. Hetta er eisini galdandi um tú umhugsar at flyta ein part av viðgerðini av persónsupplýsingum til eina útlendska fyritøku.

Dátuverndarlógin ásetur, at tú sum dátuábyrgdari skal seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini. Tú skalt í hesum sambandi hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði, slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli, umframt sannlíku váðunum og álvarum fyri rættindi hjá skrásetta.

Eydnast tað ikki at tryggja eitt hóskandi trygdarstøði, er vandi fyri, at persónsupplýsingarnar, sum tú viðger og hevur ábyrgdina fyri, enda á skeivum hondum og verða brúktar til óheimilað endamál.

Tørvurin á at tryggja eitt hóskandi trygdarstøði er størri tá talan er um viðkvæmar persónupplýsingar. Tað eru eisini aðrar umstøður, sum kunnu gera, at tað eru størri krøv til trygdarstøði. Er talan um eina stóra mongd av persónupplýsingum, sum verða fluttir uttanlands, kann váðin eisini vera størri, av tí at vinningurin fyri brotsfólk kann verða stórur um tey fáa atgongd til upplýsingarnar.

Tað er tú sjálvur, sum skal gera av, hvat eitt hóskandi trygdarstøði er fyri tær upplýsingar, sum tú viðger. Í § 46 í dátuverndarlógini eru nevnd nøkur dømi um tiltøk sum kunnu økja um trygdarstøði. Tað kann t.d. vera brongling og dulnevning av upplýsingum. Víst verður annars til vegleiðingina hjá Dátueftirlitinum um viðgerðartrygd. Vegleiðingin er á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

## 1.4 Klaga til Dátueftirlitið

Um ein skrásettur klagar um flutning av persónupplýsingum úr Føroyum, skal Dátueftirlitið viðgera klaguna og kanna, um flutningurin av persónupplýsingum úr Føroyum fór fram í samsvari við dátuverndarlógina.

Í sambandi við viðgerð av einari klagu hevur Dátueftirlitið nakrar heimildir sum eftirlitið kann nýta. Dátueftirlitið kann t.d. geva einum dátuábyrgdara eina átalu ella krevja, at dátuábyrgdarin steðgar flutningi av persónupplýsingum úr Føroyum. Í ringasta føri kann ein privatur dátuábyrgdari revsast við sekt fyri at bróta dátuverndarlógina.

# 2. Flutningur av persónupplýsingum til útlond

Útlond eru lond, sum eru limir Evropeiska Samveldinum (ES) ella í Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS).

Persónupplýsingar kunnu flytast til útlond uttan nakra góðkenning ella loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan. Treytirnar fyri viðger av persónupplýsingum í dátuverndarlógini skulu tó vera loknar, áðrenn flutningurin kann fara fram.

Um tú skal flyta persónupplýsingar til útlond, skal tú kunna skrásetta um, at persónupplýsingar nú verða viðgjørdar í útlondunum. Tú skal eisini upplýsa, hvat land upplýsingarnar verða fluttar til. Víst verður annars til vegleiðingina um kunningarskylduna hjá dátuábyrgdaranum. Vegleiðingin er á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

# 3. Flutningur til trygg triðjalond

"Triðjalond" eru lond, sum ikki eru limir í ES ella EBS. Í dátuverndarlógini verður munur gjørdur á "tryggum triðjalondum" og "ótryggum triðjalondum".

Landsstýrismaðurin hevur í dátuverndarlógini heimild til at áseta, at eitt triðjaland, eitt øki ella geiri í triðjalandinum ella millumtjóðafelagsskapi hevur eitt nøktandi verndarstøði. Triðjalond, sum landsstýrismaðurin hevur mett hava eitt hóskandi verndarstøði, verða í vanligari talu nevnd "trygg triðjalond".

Tað er bara landsstýrismaðurin, sum kann áseta, at eitt triðjaland, eitt øki ella ein ella fleiri ávísar geirar í einum triðjalandi ella millumtjóðafelagsskapi hava eitt verndarstøði, sum svarar til verndarstøðið av persónupplýsingum í Føroyum.

Tá landsstýrismaðurin hevur ásett, at eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskapur hevur eitt nøktandi verndarstøði, kunnu persónupplýsingar flytast til ein móttakara í triðjalandinum uttan nakra góðkenning ella loyvi frá Dátueftirlitinum. Treytirnar fyri viðgerð av persónupplýsingum í dátuverndarlógini skulu tó vera loknar, millum annað meginreglurnar og viðgerðarreglurnar í kapitli 2 í dátuverndarlógini.

Um tú ætlar at flyta persónupplýsingar til eitt triðjaland, skal tú tí fyrst kanna, um landsstýrismaðurin hevur ásett, at triðjalandið ella millumtjóðafelagsskapurin, hevur eitt nøktandi verndarstøði.

Landsstýrismaðurin hevur í hesum samband í kunngerð[1] ásett, hvørji lond hava eitt hóskandi verndarstøði av persónupplýsingum. Londini eru hesi:

[1] Kunngerð nr. 175 frá 16. desember 2020, sum kemur í gildi 1. januar 2021

| Yvirlit yvir trygg triðjalond | | | |
|---|---|---|---|
| Andorra | Argentina | Gilbraltar | Guernsey |
| Isle of Man | Ísrael | Japan | Jersey |
| Ný Sæland | Sameinda Kongsríki, t.e. Ongland, Wales, Skotland og Norðurírland | Sveis | Uruguai |

| Yvirlit yvir trygg øki í einum triðjalandi | |
|---|---|
| Kanada | Flutningur til vinnuligar fyritøkur |

Um landsstýrismaðurin metir, at eitt triðjaland ikki longur hevur eitt hóskandi verndarstøði, verður landið tikið av listanum aftur.

# 4. Flutningur til ótrygg triðjalond – fullgóð trygd

Um tú ætlar at flyta persónupplýsingar til eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap, sum ikki stendur á yvirlitinum yvir trygg triðjalond, gerst talan um flutning av persónupplýsingum til "ótrygt triðjaland".

Um persónupplýsingar skulu flytast til eitt ótrygt triðjaland er útgangsstøði, at hetta einans kann gerast, um tann sum flytur persónupplýsingar úr Føroyum, kann veita fullgóða trygd fyri dátuverndina. Tað er eisini ein treyt, at skrásetti kann handhevja síni rættindi í dátuverndarlógini, og at virkin rættarstig eru tøk fyri skrásetta.

Sambært dátuverndarlógini kann fullgóð trygd veitast í

- einum bindandi skjali, sum kann handhevjast, millum almennar myndugleikar
- standardásetingum um dátuvernd
- einari ad hoc-avtalu

Fullgóð trygd kann tískil t.d. veitast ígjøgnum eina avtalu millum tann, sum flytur persónupplýsingar úr Føroyum og tann sum móttekur persónupplýsingarnar í triðjalandinum.

Niðanfyri undir punkit 5 eru nevnd nøkur serlig undantøk, tá persónupplýsingar kunnu flytast til ótrygg triðjalond, sjálvt um fullgóð trygd ikki verður veitt fyri dátuverndina.

## 4.1 Bindandi skjal millum almennar myndugleikar

Almennir myndugleikar kunnu flyta persónupplýsingar ímillum sín, um hetta verður gjørt sambært einum bindandi skjali, sum kann handhevjast. Dømi um hetta kann vera ein avtala um avhending av upplýsingum á skattaøkinum.

### Dømi 3

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt eina dupultskattaavtalu við USA. Avtalan er eitt bindandi skjal. Í avtaluni er ásett, hvørjar upplýsingar kunnu avhendast á skattaøkinum millum Føroyar og USA.

*Tá talan er um eitt bindandi skjal millum almennar myndugleikar, kunnu persónupplýsingar flytast til skattamyndugleikarnar í USA, uttan at Fíggjarmálaráðið skal hava góðkenning frá Dátueftirlitinum áðrenn.*

## 4.2 Standardásetingar um dátuvernd

Fullgóða trygdin kann eisini uttan góðkenning el.tíl. frá Dátueftirlitinum veitast í standardásetingum um dátuvernd. Tað er tó eitt krav, at standardásetingarnar eru góðkendar av landsstýrismanninum. Í verandi løtu eru ongar standardásetingar um dátuvernd góðkendar av landsstýrismanninum.

ES-nevndin hevur gjørt standardásetingar um dátuvernd. Føroyskar fyritøkur og stovnar hava tí tann møguleika at nýta standardásetingarnar hjá ES-nevndini, sum íblástur til hesar ásetingar. Tað er tó ein treyt, at góðkenning verður fingin frá Dátueftirlitinum, áðrenn persónupplýsingar verða fluttar uttanlands eftir standardásetingunum hjá ES-nevndini. Leinkja til standardásetingar um dátuvernd hjá ES-nevndini eru á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

## 4.3 Ad hoc–avtalur

Ad hoc-actalur kunnu vera samansettar øðrvísi enn standardásetingarnar um dátuvernd, sum ES-nevndin hevur gjørt.

Fyrimunurin við at nýta ad hoc-avtalur er, at fyritøkur og stovnar sjálvi kunnu avtala innihaldið í avtaluni.

Bágin við at nýta ad hoc-avtalur er, at flutningur av persónupplýsingum eftir einari ad hoc-avtalu krevur góðkenning frá Dátueftirlitinum frammanundan.

Um ein fyritøka ætlar at brúka eina ad hoc-avtalu, sum grundarlag undir flutninginum til eitt ótrygt triðjaland, skal hendan latast Dátueftirlitinum í góðari tíð undan flutninginum. Hetta kemst av, at Dátueftirlitið skal gera eina ítøkiliga meting av, um avtalan veitir fullgóða trygd fyri dátuverndini, og hetta kann taka eftirlitinum tíð.

Um tú ætlar at brúka eina ad hoc-avtalu, kann tað vera ein fyrimunur at taka útgangsstøði í standardásetingunum um dátuvernd hjá ES-nevndini, sbr. omanfyri undir pkt. 4.2. Ein ad-hoc-avtala kann innihalda nógv av teimum somu elementunum, og um avtalan er grundað á standardásetingarnar hjá ES-nevndini, kann málsviðgerðin hjá Dátueftirlitinum avgreiðast skjótari.

# 5. Flutningur til ótrygg triðjalond – serlig undantøk

Um tað ikki er gjørligt at veita fullgóða trygd fyri dátuverndini í einari avtalu, kann flutningurin fara fram, um eitt av teimum serligu undantøkunum gera seg galdandi.

Um tú skalt brúka eitt av teimum serligu undantøkunum, er tað umráðandi eisini at minnast til, at krøvini til viðger av persónupplýsingum í dátuverndarlógini, skulu vera lokin undir øllum umstøðum.

Tú skal eisini leggja til merkis, at talan er um undantøk, sum skulu nýtast í ein avmarkaðan mun. Undantøkini skulu tulkast restriktivt, og kunnu t.d. ikki brúkast tá ein stór mongd av persónupplýsingum skulu flytast til eitt ótrygt triðjaland. Undantøkini kunnu heldur ikki nýtast, tá talan er um endurtakandi flutning av persónupplýsingum.

Undantøkini eru:

- Nágreiniligt samtykki
- Neyðugt fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran
- Neyðugt fyri at fáa í lag ella halda eina avtalu, sum er til fyrimuns fyri skrásetta
- Neyðugt fyri týðandi samfelagsáhugamál
- Neyðugt fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast
- Neyðugt fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta
- Flutningurin verður framdur frá einari skrá
- Týðandi heimilað áhugamál hjá dátuábyrgdaranum og hóskandi trygd verður veitt

## 5.1 Nágreiniligt samtykki

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til flutningin.

Talan skal vera um eitt sjálvboðið, nágreiniligt, kunnað og greitt viljaboð frá skrásetta, har skrásetti við fráboðan ella greiðari váttan játtar, at persónupplýsingar um viðkomandi kunnu

flytast til triðjalandið. Áðrenn samtykkið verður givið, skal skrásetti kunnast um teir møguligu váðar sum kunnu standast av flutninginum.

Dømi um váðar, sum kunnu standast av at flyta persónupplýsingar til ótrygg triðjalond, uttan at fullgóð trygd er veitt fyri flutninginum, kunnu vera, at triðjalandið ikki hevur reglur um vernd av persónupplýsingum, sum millum annað tryggja, at persónupplýsingarnar ikki enda í hondunum hjá óviðkomandi.

Legg til merkis, at samtykkið ikki kann brúkast av almennum myndugleikum, tá teir røkja sínar uppgávur.

### Dømi 4

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur í sambandi við eina granskingarætlan tikið blóðroyndir frá luttakarunum. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu ætlar at senda blóðroyndirnar til eitt universitet í USA til greiningar.

*Tá USA er eitt ótrygd triðjaland er neyðugt við einari serstakari heimild til flutningin av persónupplýsingum (blóðroyndir) til USA. Heimildin vil í hesum føri verða eitt nágreiniligt samtykki frá hvørjum einstøkum luttakara av tí at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í hesum føri ikki røkir eina uppgávu sum ein almennur myndugleiki.*

## 5.2 Neyðugt fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin er neyðugur fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran ella fyri at fremja tey tiltøk, sum verða sett í verk eftir áheitan frá skrásetta, áðrenn avtalan verður inngingin.

Undantaksreglan kann einans nýtast, um flutningurin er neyðugur. Tað skal tískil vera eitt tætt og týðandi samband millum flutningin av persónupplýsingum til triðjalandið og endamálið við avtaluni.

**Dømi 5**

Ein føroysk ferðaskrivstova hevur gjørt eina avtalu við ein bólk av ferðandi um at skipa fyri einari rundferð í Peru. Í tí sambandi skal ferðaskrivstovan send nøvnini hjá teimum ferðandi til ein bussførara í Lima, sum skal koyra tey ferðandi frá Lima til Machu Picchu.

*Um ein partur av avtaluni ímillum ferðaskrivstovuna og tey ferðandi er, at ferðaskrivstovan skal syrgja fyri, at bólkurin verður fluttur við bussi millum Lima og Machu Picchu, so kann ferðaskrivstovan senda nøvnini hjá teimum ferðandi til bussføraran í Lima, um hetta er ein treyt fyri, at bussførarin kann koyra bólkin til Machu Picchu.*

Á sama hátt sum við samtykki, kann hendan undantaksreglan ikki brúkast av almennum myndugleikum, tá teir røkja sínar uppgávur.

## 5.3 Neyðugt fyri at fáa í lag ella halda eina avtalu, sum er til fyrimuns fyri skrásetta

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin er neyðugur fyri at fáa í lag ella halda eina avtalu, sum er til fyrimuns fyri skrásetta og sum er inngingin ímillum dátuábyrgdara og ein annan likamligan ella løgfrøðiligan persón.

Í mótsetningi til undantakið omanfyri er tað ikki eitt krav, at skrásetti er ein partur av avtaluni, men einans at avtalan er til fyrimuns fyri skrásetta.

Hendan undantaksreglan kann einans nýtast, um flutningurin er neyðugur. Tað skal tí vera eitt tætt og týðandi samband millum flutningin av persónupplýsingum og endamálið við avtaluni.

Hendan undantaksreglan kann heldur ikki brúkast av almennum myndugleikum, tá teir røkja sínar uppgávur.

## 5.4 Neyðugt fyri týðandi samfelagsáhugamál

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin er neyðugur við atliti til týðandi samfelagsáhugamál.

Eitt týðandi samfelagsáhugamál kann t.d. vera útveksling av upplýsingum millum kappingareftirlit. Eitt annað dømi er útveksling av upplýsingum við atliti til fólkaheilsuna í samband við smittusporing undir einari alheimsfarsótt.

### Dømi 6

Ein føroyskur borgari hevur verið og ferðast á Gran Canaria. Tá viðkomandi kemur heimaftur, verður staðfest, at viðkomandi hevur fingið COVID-19. Føroyingurin hevur ferðast saman við einum bólki av avstraliarum. Teir føroysku heilsumyndugleikarnir velja tí seta seg í samband við heilsumyndugleikarnar í Avstralia fyri at kunna teir um eitt møguligt COVID-19 útbrot. Í tí sambandi verða persónupplýsingar um tann føroyska borgaran fluttar til Avstralia.

*Tá tað er eitt týðandi samfelagsáhugamál - bæði í Føroyum og Avstralia – at steðga COVID-19 smittuni, kann flutningurin av persónupplýsingum í hesum føri metast at vera til eitt týðandi samfelagsáhugamál. Tískil kunnu teir føroysku heilsumyndugleikarnir flyta upplýsingar úr Føroyum til heilsumyndugleikarnar í Avstralia.*

## 5.5 Neyðugt fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um tað er neyðugt fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.

Rættarkravið kann ikki hava støði í avgerð, dómi ella øðrum, sum er tikin av einum dómstóli ella myndugleika í einum landi uttan fyri Føroyar. Avgerðir o.a. frá útlendskum myndugleikum kunnu einans handhevjast í Føroyum, um hetta byggir á sáttmála ella líknandi ímillum Føroyar og triðjalandi um sínámillum rættarhjálp.

Persónupplýsingar kunnu einans flytast, um flutningurin er neyðugur fyri at rættarkravið kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Tað skal tískil vera eitt tætt samband millum upplýsingarnar og rættarkravið, sum skal sannast, gerast galdandi ella verjast fyri at flutningurin kann sigast at vera neyðugur.

## 5.6 Neyðugt fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin er neyðugur fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ella øðrum persóni.

Undantakið kann t.d. brúkast í teimum førum, tá ein persónur hevur tørv á akuttari læknahjálp, og tað verur mett at vera altumráðandi at fáa upplýsingar um viðkomandi frá Landssjúkrahúsinum. Í hesum føri kann tað í metingini vera komið fram til, at tað er altumráðandi, at upplýsingar um viðkomandi verða fluttar frá Landssjúkrahúsinum til tað ótrygga triðjalandi, fyri at persónurin kann fáa læknahjálp. Verndin av persónupplýsingunum hjá viðkomandi ikki vigar eins høgt í hesum føri.

Um skrásetti hevur møguleika fyri at geva samtykki til flutningin, kann undantaksreglan ikki nýtast.

Undantakið kann ikki brúkast til at flyta heilsuupplýsingar til eitt ótrygd triðjaland um t.d. endamálið er almenn læknafrøðilig gransking.

### Dømi 7

Ein føroysk kvinna er og ferðast í USA. Í USA verður kvinnan smittað av COVID-19 og má innleggjast á eitt sjúkrahús í USA. Fyri at kvinnan kann fáa nøktandi sjúkraviðgerð, hevur sjúkrahúsið brúk fyri at fáa nakrar ávísar heilsuupplýsingar um kvinnuna úr Føroyum. Kvinnan er í koma og hevur ikki møguleika fyri at geva samtykki.

*Í hesum føri er tað eitt altumráðandi áhugamál hjá kvinnuni, sum er innløgd, at hon kann fáa eina so góða og rætta viðgerð sum gjørligt. Í metingini kann tað tí verða komið fram til, at flutningurin av heilsuupplýsingum um kvinnuna til USA er neyðugur fyri at hon kann fáa eina nøktandi viðgerð. Landssjúkrahúsið kann tí flyta upplýsingar um kvinnuna til sjúkrahúsið í USA.*

## 5.7 Flutningurin verður framdur frá einari skrá

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin verður framdur frá eini skrá, sum sambært lóg er ætlað at kunna almenningin, og sum er atkomulig hjá almenninginum ella hjá persónum, sum kunnu ávísa at hava eitt heimilað áhugamál í hesum, um treytirnar fyri almennari atkomu eru loknar í hvørjum einstøkum føri.

Privatar skráir, t.d. ein privat kreditmetingsskrá, eru ikki fevndar av undantakinum. Flutningurin skal heldur ikki fevna um alla skránna ella ein heilan flokk av upplýsingum. T.d.

kann flutningur av øllum heilsuupplýsingum hjá persónum við einari ávísari átrúnaðarligari sannføring úr einari almennari skrá ikki fara fram.

## 5.8 Týðandi heimilað áhugamál hjá dátuábyrgdaranum og hóskandi trygd verður veitt

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt ótrygt triðjaland, um flutningurin er neyðugur í mun til týðandi heimilað áhugamál, sum dátuábyrgdarin fylgir, og áhugamálini ella rættindini hjá skrásetta ikki ganga fram um hesi áhugamál. Harafturat krevst, at dátuábyrgdarin metir um allar umstøður í sambandi við flutningin og á hesum grundarlagi veitir fullgóða trygd fyri vernd av persónupplýsingum.

Tað er umráðandi at leggja til merkis, at hendan undantaksreglan kann bara brúkast í einkultum førum, og bara tá talan er um eina avmarkaða mongd av skrásettum og ongin av hinum undantøkunum omanfyri kunnu brúkast.

Tað er eisini eitt krav, at Dátueftirlitið verður kunnað um flutningin, og at skrásetti verður kunnaður um tey týðandi áhugamál, sum eru løgd til grund fyri flutningin.

### 5.8.1 Nærri um týðandi heimilað áhugamál hjá dátuábyrgdaranum

Tað er eitt krav, at talan skal vera um eitt "týðandi" áhugamál hjá dátuábyrgdaranum at flutningurin verður framdur. Einans áhugamál sum eru "týðandi" fyri dátuábyrgdaran kunnu vera grundarlag undir flutninginum.

Tað er týdningarmikið at leggja til merkis, at gáttin í hesum sambandi er hægri enn aðrastaðni í dátuverndarlógini. T.d. vilja ikki øll heimilað áhugamál (sum í § 8, stk. 1, nr. 6, í dátuverndarlógini) kunna metast at verða "týðandi".

Tey týðandi heimilaðu áhugamálini skulu vera altavgerandi fyri dátuábyrgdaran. Dømi um hetta kann vera, at dátuábyrgdarin er noyddur til at flyta allar persónupplýsingar til eitt ótrygd triðjaland fyri at verja fyritøkuna ella skipanir hjá fyritøkuni, ímóti einum álvarsomum skaða, sum kann fáa stóra ávirkan á fyritøkuna.

### 5.8.2 Meting av um tey týðandi áhugamálini hjá dátuábyrgdaranum viga tyngri enn áhugamálini og rættindini hjá skrásetta

Undantakið setur krav um, at dátuábyrgdarin skal meta, um tey týðandi áhugamálini hjá honum viga tyngri enn áhugamálini og rættindini hjá skrásetta.

Dátuábyrgdarin skal nágreiniliga meta, um hvørjar møguligar avleiðingar flutningurin kann hava fyri skrásetta og í hvønn mun flutningurin kann skaða skrásetta (fysiskt, materielt og immaterielt).

### 5.8.3 Nærri um fullgóða trygd fyri vernd av persónupplýsingum

Dátuábyrgdarin skal meta um allar umstøðurnar í samband við flutningin og við støði í hesum veita fullgóða trygd fyri verndini av persónupplýsingunum. Dátuábyrgdarin skal taka atlit til slag av persónupplýsingum, endamálið við viðgerðini, hvussu langt tíðarskeið viðgerðin er farin fram, støðuna í upprunalandinum, triðjalandinum og í tí landinum har upplýsingarnar verða fluttar. Dátuábyrgdarin skal harafturat kortleggja møguleikarnar og álvaran av møguligum avleiðingum og váðum.

Um trygdin fyri verndini av persónupplýsingunum kann metast at vera fullgóð, skal metast ítøkiliga í hvørjari støðu sær. Treytað av støðuni, kann fullgóð trygd t.d. vera

- tiltøk sum tryggja at upplýsingarnar strikast skjótast gjørligt, eftir flutningin
- dulnevning ella brongling av upplýsingunum
- tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja, at upplýsingarnar einans verða nýttar til avmarkað endamál

### 5.8.4 Nærri um kunning til skrásetta

Dátuábyrgdarin skal kunna skrásetta um flutningin og tey týðandi áhugamál, sum verða fylgd. Hesar upplýsingar skulu gevast afturat teimum upplýsingum, sum dátuábyrgdarin hevur skyldu til at geva eftir §§ 23 og 24 í dátuverndarlógini.

### 5.8.5 Nærri um kunning til Dátueftirlitið

Dátuábyrgdarin hevur skyldu til at kunna Dátueftirlitið um flutningin. Dátueftirlitið skal ikki góðkenna flutningin. Kunningarskyldan er í staðin ætlað sum ein eyka trygd fyri skrásetta, tí at Dátueftirlitið tá hevur møguleika fyri at meta um ávirkanina, sum flutningurin kann hava á áhugamálini og rættindini hjá skrásetta.

## Dømi 8

Fyritøkan "Jassar" selur klæðir á netinum. Skipanin hjá Jassum er hýst á einum ambætara hjá Google í Írlandi. Persónupplýsingarnar sum eru í skipanini, eru upplýsingar um navn og bústað hjá kundunum.

Allir servarar hjá Google í Evropa verða álopnir. Google boðar Jassum frá, at einasti møguleiki at verja skipanina hjá Jassum er at flyta hýsingina av skipanini til ein ambætara í Australia inntil ambætarin í Írlandi er tryggur aftur. Google boðar frá, at um hetta ikki verður gjørt beinanvegin, er stórur vandi fyri, at øll skipanin hjá Jassum verður oyðiløgd. Fyri Jassar kann hetta hava stórar avleiðingar, tí um skipanin fer fyri onki, má tað byrjast av nýggjum. Google boðar eisini frá, at tað letur seg ikki gera at strika upplýsingarnar í skipanini soleiðis at tað bara er skipanin sjálv sum verður flutt til Avstralia.

Google boðar frá, at upplýsingarnar á skipanini verða bronglaðar, tá tær verða sendar til Avstralia, og at tær verða fluttar aftur til ambætaran í Írlandi so skjótt hetta letur seg gera, og at upplýsingarnar tá verða strikaðar í Avstralia.

*Um tað hevur við sær stóran fíggjarligan miss fyri fyritøkuna, um skipanin hjá fyritøkuni við upplýsingum verður oyðiløgd, kann Jassur í metingini koma fram til, at tað er eitt týðandi áhugamál hjá fyritøkuni, at skipanin við upplýsingum verður flutt til Avstralia. Tá upplýsingarnar verða bronglaðar, kann niðurstøðan verða, at váðin fyri skrásetta er avmarkaður og at tey týðandi áhugamálini hjá fyritøkuni eru størri. Jassur skal tó kunna allar kundarnar, at teirra upplýsingar verða fluttar til Avstralia. Dátueftirlitið skal eisini kunnast um flutningin.*

# 6. Skund vegleiðing um flutning

**1. Skulu upplýsingar flytast úr Føroyum?**

- Umhugsa, um upplýsingarnar eru persónupplýsingar, um talan er um flutning og um flutningurin er til eitt útland ella triðjaland.
- Um hetta er so, fær so víðari til næstu boks.

**2. Er dátuverndarlógin yvirhildin?**

- Umhugsa, um viðgerðin er í samsvari við dátuverndarlógina, áðrenn flutningurin fer fram
- Um hetta er so, fær víðari til næstu boks.
- Um hetta ikki er galdandi, kann flutningurin ikki fara fram.

**3. Flutningur til útland ella triðjaland?**

- Kanna um landið er eitt útland ella eitt triðjaland sum er góðkent av landsstýrinum
- Um hetta ger seg galdnadi kann flutningurin uttan víðari fara fram
- Um hetta ikki ger seg galdandi fær so víðari til næstu boks.

**4. Flutningur til ótrygg triðjalond**

- kanna, um fullgóð trygd er veitt fyri flutninginum.
- um hetta ger seg galdandi, kann flutningurin fara fram.
- um hetta ikki ger seg galdandi, fær so víðari til næstu boks.

**5. Serlig undantøk?**

- Umhugsa, um flutningurin til triðjalandi kann fara fram eftir einu av serligu undantøkunum í dátuverndarlógini.
- um hetta ger seg galdandi, kann flutningurin fara fram.
- um hetta ikki ger seg galdandi, kann flutningurin ikki fara fram.

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið